Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingsmaður

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Føroyskt í Føroya Rætti

Spurningar:

1. Er arbeiðið byrjað við at fáa føroyskt sum formligt rættarmál í Føroya Rætti?
2. Um ja, nær verður hetta arbeiðið liðugt?

Viðmerkingar:
Kjak hevur tikið seg upp í seinastuni eftir, at grønlendska fólkatingskvinnan, Aki-Matilda Høegh Dam úr Siimut tók orðið á grønlendskum í Fólkatinginum. Við hesum vildi hon vísa á, at Grønland ikki er eitt javnsett land í ríkisfelagsskapinum við egnum máli, mentan og søgu.

Stríðið fyri føroyska málinum hevur eisini verið langt og drúgt, men enn er langt á mál. Í samgonguskjalinum millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn frá 2022 stendur, at virkað verður fyri, at føroyskt verður formligt rættarmál í Føroya Rætti.

Í dag eru rættarskipanin og løgreglan felagsmál. Dómsvald og løgregla eru sera týdningarmiklir stovnar fyri eitt hvørt samfelag. Sum ein liður í, at vit arbeiða fram ímóti at fáa rættarskipanina á føroyskar hendur, er ein fyrsta treyt, at tað verður tosað føroyskt í Føroya Rætti, og at føroyskt er formligt mál í Føroya Rætti.

Í dag kemur meir enn so fyri, at borgarar mugu tosa danskt í Føroya Rætti, tí dómarin ella ákærin ikki skilja føroyskt. Tað eru støður, har ein føroyingur skal greiða frá truplum, eymum og syrgiligum viðurskiftum á donskum. Tað kann til dømis vera at greiða frá einari neyðtøku ella øðrum traumatiserandi hendingum, meðan tú samstundis skalt hugsa um, hvussu tú orðar teg á einum øðrum máli enn tínum egna móðurmáli í Føroyum. Hetta kann ganga rættartrygdini hjá okkara borgarum ov nær.

Í rættargangslógini stendur púra greitt, at føroyskt er rættarmál í Føroya Rætti, men hóast hetta er er øll kunning og skrivligt samskifti frá ríksimyndugleikunum á donskum.

Tí verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 16. mai 2023

Annika Olsen